# Krevur at útlendingamálið verður tikið í størsta álvara

**Aftur í gjár var kjak í Løgtinginum um útlendingapolitikkin og tað hevði hug at harðna**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Útlendingamálið er so torført, at tað krevur fullan seriøsitet frá øllum flokkum, eisini frá andstøðuni og eisini frá tjóðveldisflokkinum

Við hesari heilsanini setti løgmaður punktum fyri einum lívligum kjaki í løgtinginum í gjár um útlendingamálið.

Tað var Heidi Petersen, løgtingskvinna fyri tjóðveldisflokkin, sum reisti málið.

Hon staðfesti, at eftir avtaluni við donsku stjórnini var tað heilt greitt, at tað bara vóru tey, sum kundu halda fram hjá sama arbeiðsgevara, ið kundu fáa eina so lagaliga viðgerð, sum gjørligt, tá ið søkt varð um at fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi longt. Øll hini skuldu viðgerast, sum um tað var fyrstu ferð at tey søktu, hóast tey vóru í landinum frammanundan. Tað merkir, at hugsast skuldi um arbeiðsloysið í landinum.


*Løgtingið hevur enn einaferð havt útlendingapolitikkin til viðgerðar í einum orðaskifti, sum hevði hug at harðna*

Hon helt tí, at løgmaður kastar ábyrgdina frá sær, tá ið hann nú harmast um, at útlendingur, ið hevur skift arbeiðsgevara, verður vístur av landinum.

Hon helt eisini, at tá ið nú løgmaður vaskaði sínar hendur, er tað at siga ósatt við vilja, ella hevur hann ikki evni at lesa eina avtalu, sum hann sjálvur hevur góðkent.

Heidi Petersen vildi tí hava at vita, hvørja ábyrgd løgmaður tekur á seg í teirri stóru óvissu, ið valdar á útlendingaøkinum.

## Kom rumbul í

Løgmaður læt ongan iva verða um, at hann viðurkendi sær sína ábyrgd av útlendingapolitikkinum, men at tað var Jacob Vestergaard, sum varaði av málinum

Hansara uppgáva hevur verið at samskipa arbeiðið.

– Tá ið hetta landsstýrið tók við, vóru ongar yvirskipaðar leiðreglur fyri, hvørja kós, landsstýrið skuldi hava í útlendingamál og tað kom skjótt rumbul í, tí umsóknirnar vóru nógvar.

Sostatt var málið tikið upp politiskt og tað varð gjørt greitt, at umsóknirnar í Føroyum skuldi viðgerðast soleiðis, at teir umsøkjarar, sum høvdu váttan frá arbeiðsgevara, skuldu fáa loyvið longt. Ein fortreyt var sjálvsagt, at hetta skuldi vera innan fyri lógarinnar karmar.

Men av tí, at talan er um danskt málsøkið, má tað vera danska stjórnin, sum ásetir karmarnar. Samstundis fegnaðist hann um, at nýggi landsstýrismaðurin hevur lovað at seta ferð á arbeiðið at útgreina útlendingamálið.

Løgmaður er greiður yvir, at tá ið talan var um at longja arbeiðs- og uppihaldsloyvið, skal talan vera um ein og sama arbeiðsgevara.

Men kortini hevur tað í einstøkum føri borið til at viðmælt umsóknir, hóast talan hevur verið um at skift arbeiðsgevara, tá ið umsøkjarin hevur havt serligar førleikar, antin tað var sum teldufólk, lækni ella kílaskerari.

At avgreiðslutiðin hevur verið long, hevur sett umsøkjarar, sum hava verið her leingi í eina torføra støðu og tað er harmiligt.

– Men júst tí hevur tað stóran týdning, at tað verður loyst og at tað ikki verður brúkt til at mala í klingur í partapolitiskum retorikki.

## Sleppur ikki takinum

Hann staðfesti tí, at nú var gongd sett á málið og hann ætlaði ikki at sleppa takinum, fyrrenn tað var loyst.

Tjóðveldisfólk vísti á, at tá ið hetta landsstýrið kom til, var ein greið avtala við donsku stjórnina og tey harmaðust um, at tann avtalan ikki varð undirskrivað og sett í verk. Summi tingfólk átalaðu eisini, at landsstýrið ikki hevði yvirtikið málið.

Hetta fekk løgmann at harðnað á málinumog hann spurdi, hví tjóðveldisfólk kravdu, at hendan samgongan skuldi klára at yvirtaka og loysa málið upp á tvey ár, tá ið tjóðveldisflokkurin ikki kláraði at gera nakað sum helst við málið øll tey seks árini hann sat í samgongu.

– Tað er at renna undan ábyrgd helt hann.

Heidi Petersen átalaði, at undanfarna samgongan skuldi fáa skyldina. Hon segði, at veruleikin var, at hjá undanfarnu samgongu var ongin trupulleiki, tí tá tók tað tvær vikur at avgreiða umsóknir, men hendan samgongan hevur niður-raðfest umsitingina og hevur forkludrað tað politiskt, so at viðgerðartíðin nú er 18 mánaðir.

Løgmaður vísti hesum aftur. Hann minti á, at fyrst í nítiárunum hevði hann ábyrgdina av arbeiðsmarknaðarmálum tá ið arbeiðsloysið var 25% og tað var ikki eitt tað einasta eitt útlendingamál, sum endaði í fjølmiðlunum.

Hann segði, at trupulleikin tók seg upp, tá ið Høgni Hoydal byrjaði at málsviðgerða hvørja einastu umsókn, uttan at umsitingin var til reiðar til tað og tað er hesar trupulleikar, hendan samgongan hevur arvað.

Annarst helt løgmaður, at Heidi Petersen bara royndi at sláa politiskt platt uppá eitt so kensluborið mál, sum hetta.

– Tað er totalt langt úti og tað má eg ávara ímóti. Hetta málið er so trupult, at tað krevur fullan seriøsitet, eisini frá andstøðuni og eisini frá tjóðveldisflokkinum.

## Basalt í Kagganum

Hetta vikuskiftið spæla Basalt til dans í Kagganum. Teir bjóða sítt vanliga bland av kontrirokki og øðrum dansivinarligum tónleiki.

Basalt eru Poul Müller (sang, mandolin og gittar), Kári Olsen (sang og gittar), Kenneth (ljómborð og sang), Mikkjal Øster (bass) og Annfinnur Jacobsen (trummir og sang). Verandi manning hevur spælt saman síðan 1998, men bólkurin hevur røtur heilt afturi í sjeyti árunum í bólkinum TARTA, ið Poul, Kenneth og Mikkjal spældu við í. Teir spæla kl. 0.30-3.30 í nýumvælda Kagganum fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

**nud**

## Húsorkestrið og dansiorkestrið í Glitni

Aftur hetta vikuskiftið verður dansur í Glitni. Sum vænt byrjar tað við hósdagsdansi við húsorkestrinum. Síðan tekur Dansiorkestrið yvir og spælir fríggjakvøld og leygarkvøldið.

Húsaorkestrið við Georg Eystan Á og Sólvu Ford eru við sínum dansivinarliga kontrikenda tónleiki vorðin húsfólk í Glitni hvørt hóskvøld. Meðan Dansiorkestrið – við Erling Berg sum oddamanni, eisini hevur spælt í Glitni fleiri ferðir fyrr. Dansiorkestrið spælir slagarar og svingarar, so tað er um at sleppa sær í dansiskógvarnar sum skjótast.

**nud**

## Signar á Sandi

Fríggjakvøldið fáa sandingar og sandoyingar annars høvið at hoyra Signar í Homrum í Texas. Hetta er aðru ferð at Signar vitjar spælistaðið á Sandi sum einstaklingur.

Signar, ið gjørdist heimskendum í Føroyum við bólkinum Kjølum, hevur seinastu árini verið virkin, sum einstaklingur og í rokkbólkinum ROK. Í Prix Føroyum í ár, vístu Rok, at teir eisini meistra lagaskriving. Signar spælir í Texa frá kl. 21 til kl 3.

**nud**

## Andrew Joseph í Café Natúr

Aftur hesa vikuna er ein avstralskur trubadurur at hoyra í REX. Talen er um Andrew Joseph, ið fer at undirhalda frá í kvøld til og við sunnkvøldið. Nógvir avstraliskir trubadurar hava vitjað Café Natúr seinastu mánaðarnar.

**nud**

Lensipumpur / Bátapumpur 12 volt
Støddir: 22 ltr/min. 30, 70 og 95


Ein góð jólagáva
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK · TEL 31 56 00
Sosialurin 341800